# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Oddmar Hansen, Vestmanna**, ættaður úr Skopun, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsmorgunin 26. januar, 76 ára gamal.

**Aska Maria Jensen** fer til gravar úr Kirkjugarðskapellinum í Havn fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Asku, kunnu lata Sclerosufelagnum eina gávu.

**Hensar Ellingsgaard, fyrrverandi landsskúlastjóri, Tórshavn**, andaðist sunnudagin, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Hensar, kunnu lata KFUM-skótunum eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Gudrun Schanke, vanliga nevnd Gudde**, andaðist í Stavanger leygardagin 23. januar, 85 ára gomul. Jarðarferðin verður fríggjadagin 29. januar frá Utstein kloster við Stavanger.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Thorbjørn Lisberg**
Trongisvágur

andaðist í heiminum týsdagin 26. januar, 88 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jens og Marner**

## Hugarensl um vinin

# Reinhold Nielsen



Løgið at vita teg farnan til Jesus
Hann, sum tú elskaði meiri enn alt
Hann, sum teg myndaði uppgávu lívsins
Fjálgaði heimið sum var tær so kært.

Tøkk kæri bróður, tú spardi teg ikki,
Stuðul ómissandi verkinum var
Legði títt oyra til Frelsarans ynski,
Framdi júst tað, ið Hann ætlaði tær.

Mong eru tey, sum sakna teg sáran
Vandu seg til tína hjálpandi hond,
Bóðu til Jesus og upplivdu síðan,
Reinhold at uppfylla tørvin hjá sær.

Eisini virki títt her á foldum
Menninir allir, sum arbeiddu har
Kendu á sær tá tú var um leiðir
Jesusar nærveru sjónska í tær.

Sjáldsamt at virða so annara gávur
Síggja av øðrum Hans virkandi hond
Altíð at draga fram virði av Gudi
Í hinum einstaka kom tær í nánd.

Var okkurt, fólk virdu lítið hjá onkrum
Knappur tú viðmerkti einstaklings dygd
Segði at eingin av góðum var sørur
Hómaði okkurt frá Skaparans hond.

Tí vart tú menniskja-veiðimaður
Evnaður til tað av Frelsarans hond
Síðani røkti tú øll hesi glaður
Komu við gleði tá tú vart í nánd

Nú eingin Reinhold er meiri á foldum
Farin úr likamið – dýrdini í-
Fyri at skoða hvat virði var í tí
Harranum tæna avmálda tíð

Anna við børnunum Jón og Charlotta,
Saknurin nívir nú tykkara heim
Vit drýpa høvur í samkenslu játta
Maður ei kemur í hansara stað.

Loyndarmál lívsins vit sóu í honum
Kristus var sjónskur tá hann var í nánd
Sjóneyku tørvaði tá eingin maður
Kristus at skoða Reinholdi í.

Nú er so kvirt í hjartanum inni
Hann næm teir streingir, sálina við,
Sum eingin annar spældi í sinni
Samljóði fullkomið var tær við lið.

**Poul Færø**

## Dagurin

**28. Januar. Karlamagnus keisari,** deyður í 814. Eini 400 ár eftir deyða sín varð hann eftir uppskoti frá týska keisaranum Fríðriki Barbarossa skírdur halgimenni, men heitið varð ikki viðurkent av pávanum í Róm. Karlamagnus hevur annars verið høgt í metum, ikki minst í Føroyum. Karl er germanskt navn og merkir maður, og Magnus er latínskt og merkir stórur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*




## Merkisdagar

**60 ára føðingardagur**
Mánadagin 25. jan. fylti Jóna Borg Dahl, í vági, 60 ár. Dagurin verður hildin í Billardhúsinum leygardagin 30. jan. frá kl. 13 til 17, har øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. feb. verður Hans Poulsen, Klaksvík, ættaður av Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verur hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík frá kl. 17.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 28. jan. fyllir Eigil Gunnarsson í Havn 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta. 9, millum kl. 16 og 20, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Sunnudagin 31. jan. fyllir Anna Louisa Jacobsen í Skálafirði 90 ár. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 29. jan. hava Ingibjørg og Olfert Debes á Oyri gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familju, leygardagin 30. jan.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 30. jan. hava hjúnini Anny og Pole Klein, Vestmanna, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin millum kl. 11 og 15 til morgunmat í kaffistovuni inni á Fjørð.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 31. jan. hava hjúnuni Sonja og Hans Olaf Andersen í Lopra gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Gullbrúðleyp**
Mánadagin 1. feb. hava Guðrun og Poul Øregaard, Kollafjørð, gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Danmark saman við børnunum.

**Diamantbrúdleyp**
Hósdagin 28. jan. hava Frida og Andrew Thomsen í Porkeri diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 5. feb. hava Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 6. feb., kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. februar. giftast Niza Pardillo, av Filipsoyggjunum og Hans Hilmar Johannesen av Toftum. Vækomst verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, ið ynskja, at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um, at siga frá á tlf. 748134/448134 innan 2. februar.